## Cole gevst

Fyrrverandi toppskjúttin hjá Newcastle og Manchester United, Andy Cole, steðgar nú yrkisleiðini sum fótbóltsspælari. Cole er í dag 37 ára gamal, og seinasta felag hansara gjørdist Nottingham Forest. Har hevur hann tó ikki spælt tað heilt stóra, og mál hevur hann als ikki skotið í teimum 10 dystunum, sum hann hevur spælt. Cole spældi eisini á enska landsliðnum, har tað gjørdist til 15 dystir og eitt mál.



## 200.000 kr. um dagin

Cristiano Ronaldo og Manchester United fara nú undir samráðingar um nýggjan sáttmála til portugisan, sum í løtuni verður roknaður sum heimsins besti spælari. Sambært enskum miðlu, so er kravið hjá Ronaldo, at hann skal hava 1,5 milliónir krónur um vikuna, um hann skal halda fram í felagnum. – Tað er vanligt, at sáttmálin hjá einum spælara endurspeglar avrik hansara. Vit skulu tosa við Manchester United, men enn er ein fundur ikki ásettur, sigur umboðsmaðurin hjá Ronaldo við SkySports.

# Høgni og Hanus aftur í ÍF

**Fuglfirðingar miðja longur upp eftir stigatalvuni í ár, og hesi útlit hava fingið Høgna Zachariassen og Hanus Eliasen at venda heim, heldur enn at halda fram hjá greipuvinnarunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Saman við Hanusi Eliasen verður Høgni Zachariassen nú aftur í barndómsfelagnum, ÍF. Teir báðir hava spælt ávíkavist eitt og tvey ár við EB/Streymi*

Í nógvar mátar var ÍF stóra positiva yvirraskilsið í Formula-deildini í ár. Liðið varð annars roknað millum niðurflytingarkandidatarnar, men hóast teir sjáldan kundu kenna seg heilt tryggar, so brendi tað sjáldan undir teimum, og við sjeynda plássinum var málið um at halda seg í deildini nátt í øllum góðum.

### Miðja hægri

Men tað tykist tó ikki steðga her hjá ÍF. Og í øllum førum eru hægri málsetningar grundleggjandi fortreytir fyri, at Høgni Zachariassen saman við Hanusi Eliasen nú aftur verður at síggja í ÍF.

- Hjá mær hevur tað sum so ikki verið nakar ivi um, at eg fyrr ella seinni kom aftur til ÍF. Men eg hevði nokk ikki roknað við, at tað skuldi henda eftir bara eitt ár í útlegd, sigur Høgni Zachariassen.

- Ikki tí. Árið við EB/Streymi hevur verið bæði stuttligt og spennandi. Persónliga var tað sjálvandi keðiligt, at eg tvær ferðir var úti við broti í fótinum, men eg fekk so nakað av spælitíð kortini, og tað var stuttligt.

- Men eg havi tosað nógv við fólkini í ÍF, og ætlanirnar har tykjast sera spennandi. Enn eru allir sáttmálar ikki komnir upp á pláss, men fáa vit spælararnar, sum ætlanin er at fáa, sær tað heilt spennandi út, haldi eg meg kunna siga.

### Vildi ikki vera keðiligur

Og hóast tú var úti í longum løtum, so verður tað væl ein spælari, sum búnaður og mentur, sum nú kemur aftur til ÍF?

- Tað vóni eg í øllum førum. Sjálvandi er tað ymiskt, hvussu árini hilnast. Men eg haldi meg hava lært nøkur ting í EB/Streymi, og vónandi kann tað koma ÍF tilgóðar, sigur Høgni.

Saman við Høgna er eisini Hanus Eliasen komin aftur til ÍF. Og Høgni sigur sjálvur, at hetta eisini vigaði við, tá avgerðin skuldi takast.

- Eg vildi so ikki standa eftir sum tann keðiligi, ið ikki kom heim til ÍF. Og sum sagt, so haldi eg, at 2009 sær rættiliga spennandi út. Og uttan at spyrja nakran eftir, so kann eg í øllum førum siga, at málið í øllum førum er nakað hægri enn sjeynda plássið, sum ÍF vann sær í ár, sigur Høgni Zachariassen.

## Russi styrkir FM-vónirnar í Havn

**Bæði kvinnurnar og unglingarnir hjá Havnar Fimleikafelag ætla sær at verða føroyameistarar í ár. Tær venja hart, og hesa tíðina eru seriurnar á skánni. Í hesum sambandi hevur Eyð Strøm verið heima og lært unglingarnir teirra seriur, og í aðru viku fáa kvinnurnar vitjan av russisku Sanyia Glyzine**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Dagarnir í seinastu viku og um vikuskiftið vóru langir hjá unglingunum í Havnar Fimleikafelag.

Eyð Strøm var komin at venja unglingarnir seriuna, sum tær skulu kappast við í ár. Áðrenn Eyð fór til Danmarkar í fjør at lesa til arkitekt, vandi hon trý kappingarlið hjá HF. Og blivu øll hennara lið føroyameistarar. Sunnudagin var framførsla fyri foreldrum og øðrum HF fjepparum í høllini á Stórheyggi, og serian í ár er einki undantak. Hon borgar fyri góðsku, so nú er »bert« eftir hjá fimleikarunum og venjarunum Ruth Smith og Annu Kristinu Niclasen at fáa tað tekniska uppá pláss og at fáa alt at sita, sum tað skal.

Serian hjá kvinnunum kemur í aðru viku. Tá kemur russiska Sanyia Glyzine til Føroya at venja kvinnurnar nakrar dagar.

Tá HF kvinnurnar blivu føroyameistarar í fjør, hevði Sanyia Glyzine gjørt seriuna við temanum »Jeanne d`arc«. Úrslitið var so mikið sannførandi, at eingin ivi var um, at felagið ynskti at fáa Sanyiu at koma aftur í ár.

Kvinnurnar og venjarin Turið Nattestad gleða seg til at Sanyia kemur. Spennandi verður at síggja, hvat hon hevur í viðførinum hesaferð.

Sanyia hevur eisini onnur góð úrslit at vísa á, eitt nú gjørdi hon seriuna til heimsmeistararnar Janika í fyrraári.



*Nógv verður lagt fyri, nú venjingarnar til FM-kappingina í estetiskum fimleiki eru komnar í hæddina*
*Mynd: Hannis P. Wardum*

# Eysturríki gav 30 stig



*Málið, sum Bogi Løkin skeyt á Tórsvølli fyri tveimum mánaðum síðani hevur flutt Føroyar 12 pláss upp á altjóða styrkislistanum fyri fótbóltstjóðir*

**Javnleikurin á Tórsvølli sæst aftur á FIFA-listanum, har Føroyar gingu 12 pláss fram**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast eitt pláss sum nummar 186 á altjóða styrkislistanum fyri fótbóltstjóðir ikki ljóðar av nógvum, so er talan um framgongd hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, sum at kalla bert er dottið longur og longur niður á FIFA-listanum seinnu árini.

Lopið hesa ferð ber eisini við sær, at Føroyar nú eisini hava lagt Andorra aftur um seg, og tí eru nú tvær aðrar europiskar tjóðir undir okkum. Hin er San Marino, sum einki stig hevur á listanum.

Sambært seinastu uppgerðini hava Føroyar 37 stig á listanum. Hinvegin verður neyðugt at fáa okkurt stigið afturat til høldar hampuliga skjótt. Sæð burtur frá javnleikinum móti Eysturríki, so skal leitast aftur til heystið 2004 fyri at finna seinasta føroyska stigið. Tá spældu Føroyar 2-2 javnleik á Cypros, men stigini fyri hendan eru nú skjótt burtur.